GJALDSTOVAN

# Samskiftisfólk til Gjaldstovuna

Dugir tú at fáast við samskifti á høgum stigi? Hevur tú royndir við at miðla og samskifta, og dugir tú at marknaðarføra tænastur? So hevur tú nú møguleikan at søkja starv sum samskiftisfólk á Gjaldstovuni. Einum stovni í broyting, sum í dag virkar meira sum tænastustovnur enn sum siðbundin myndugleikastovnur.

Gjaldstovan leitar tí eftir samskiftisfólki at standa fyri at varpa ljós á tænasturnar, sum stovnurin veitir. Partur av hesum tænastum eru tænastur, sum Talgildu Føroyar veita. Av tí at Talgildu Føroyar hava stóran tørv á at fáa hesar tænastur út til brúkararnar, verður í fyrstani talan um burturav at loysa samskiftisuppgávur fyri Talgildu Føroyar.

Tínar uppgevur eru at:

- ráðgeva leiðsluni í strategiskum spurningum innan kunning og marknaðarføring av tænastum
- samskipa og miðla marknaðarførings- og kunningarmálini á øllum stovninum
- velja, menna og seta í verk amboð í sambandi við kunning og marknaðarføring, sum t.d. heimasíður, innannet og sosialar miðlar
- vegleiða, tá ið tíðindaskriv, kunningarskriv og tilfar til heimasíður skulu skrivast
- skriva lýsingar, starvslýsingar og vera partur av kunningarskipanini í kreppustøðum
- skipa fyri tiltøkum fyri kundum og samstarvspørtum og hjálpa at vinkla innihaldið í hesum tiltøkum, t.d. við framløgum og miðlan
- allýsa og branda tænastur saman við viðkomandi starvsfeløgum.

Um teg:

- Tú hevur hægri útbúgving innan samskifti, marknaðarføring ella líknandi.
- Tú skalt duga væl at miðla, kenna til ymsa tøkni innan samskifti og helst eisini hava royndir sum samskiftisfólk.
- Tú skalt duga væl at skriva og orða teg á føroyskum, og tað er ein fyrimunur, um tú eisini dugir væl enskt.
- Tú skalt hava royndir við at skriva og leggja tilfar út á heimasíður og sosialar miðlar.
- Tú ert ágrýtin, arbeiðir miðvíst, dugir væl við fólk og hevur evni og hegni til bæði at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi.

## Setanar- og lønarviðurskifti

Starvið er fulltíðarstarv. Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Arbeiðsstaðurin er Gjaldstovan í Albert Hall á Argjum.

## Umsókn

Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum skal verða send til **starv@gjaldstovan.fo** og skal vera frámerkt "Samskiftisfólk til Gjaldstovuna".

Meiri kunning um starvið fæst við at venda sær til Nicolai Balle, deildarstjóra, á 79 24 24 ella **nicolai@talgildu.fo**

**Umsóknarfreistin er 11. januar 2021**